


*Starturin í kapprenningini Runt Agnið var við Tofta skúla og málið á Toftagjógv. Her standa rennararnir klárir at fara avstað*

*Mynd: Sølvi R. Hansen*

# 73 runnu runt Agnið

**RENNING** Rebekka Fuglø og Sam Vang vunnu ávikavist hjá monnum og kvinnum, tá vetrarkappingin í renning byrjaði leygardagin við kapprenningini Runt Agnið

**Hilmar Jan Hansen**

Hóast føroyski veturin kanska ikki altíð er tann veðurbesti, tá talan eru um at íðka ítrótt uttandura, so heldur tað ikki teimum mongu rennarunum aftur. Hetta gekk sjón fyri søgn, tá tann fyrsta av teimum tilsamans fimm vetrarrenningunum var leygardagin runt Agnið.

Fleiri og fleiri rennarar hava verið við til hesa kapping hvørt árið, og hesa ferð var heldur einki undantak, tí tað er nýtt met, at ikki færri enn 73 gjøgnumførdu. Av hesum vóru sjey dreingir, 20 kvinnur og 46 menn.

Hesa ferð var heldur einki at siga til veðrið, ið onkuntíð hevur argað júst hesa kappingina, tí frá tí at rennararnir startaðu við Tofta skúla og til teir komu á mál niðri á Toftagjógv, vóru líkindini at renna av besta slagi.

Dreingirnir, ið vóru sjey í tali, runnu ein tein upp á fimm kilometrar, og ikki óvæntað gjørdist Marnar Djurhuus vinnari við einari góðari tíð, sum var 15 minuttir og 40 sekund. Hann var tríggjar minuttir framman fyri Steffan Klein Poulsen, og á triðja plássi kom Einar Gregersen. Teir eru allir í Treysti.




*Marnar Djurhuus vann ikki óvæntað kappingina hjá dreingjunum, ið runnu helvtina av teininum, sum tey vaksnu runnu*

*Mynd: Sølvi R. Hansen*

## Nógvir vinnarar

Tey vaksnu runnu øll ein longri tein, sum var 10,3 kilometrar. Hjá kvinnunum gjørdist Rebekka Fuglø í Treysti vinnari við tíðini 45 minuttir og 42 sekund. Hon var næstan fimm minuttir framman fyri Ellu Áarstein í Treysti, sum gjørdist nummar tvey, og nummar trý var Lydia Gardar í Bragdinum. Rebekka vann eisini hjá kvinnuunglingum, har hon var einasti rennari, og Ella og Lydia gjørdust somuleiðis nummar eitt og tvey í bólkinum kvinnuveterar.

Hjá monnum vann Sam Vang í Bragdinum við tíðini 38 minuttir 43 sekund, men tað var í harðari kapping við Guttorm Sørensen í Treysti og Henry Olsen í Bragdinum, sum vóru ávikavist 14 og 28 sekund aftan fyri hann. Henry gjørdist samstundis bestur í bólkinum mansveteranar, har Borgar Biskopstø í Treysti og Andrass Joensen í Bragdinum vóru teir næstu.

Aðrir bólkar, ið kunnu nevnast, eru mansunglingar, har teir tríggir bestu rennararnir gjørdust Ólavur Egholm í Hvirluni, Hans Jacobsen í Bragdinum og Dávid Johannesen í Hvirluni. Og hjá superveteranunum, ið taldu ikki færri enn níggju, vóru tríggir teir fremstu Óli Olsen í Bragdinum, Jens R. Weihe í Frælsi og Gunnar Simonsen í Treysti.

Næsta renningin í Vetrarkappingini verður í Havn leygardagin 11. desember.

hilmarjan@sosialurin.fo